











Men sum hjá barndómsvinum flestu, so føra lívleiðirnar ymsar vegir, og Plúmm/Føstufressar hevur verið rár hending á palli seinnu árini.

Og fríggjakvøldið var heilt greitt gleðin stór í Norðurlandahúsinum at sleppa at hoyra teir saman aftur á einum og saman stað.

Og teir skuffaðu ikki!! Og stuttligt at Finnur (Hansen) líkasum gjørdi Plúmm manningina randaða, og var við Føstufressunum. Sum Terji tók til; tá hann er við, so fæst ein pakki við so nógvum í.

Holger Laumann, danski tónleikarin og Føroyavinurin, setti dám á fyrru fløguna, men hann andaðist fyri nøkrum árum síðani, men manningin á pallinum fekk einu løtuna fjøldina at minnast mannin, tá ein saxofonsolo av fløguni slapp inn ímillum í einum lag, og mynd av Holger stóð yvir pallinum hesa stundina.

Konsertin fríggjakvøldið var fyrst og fremst ein staðfesting. Terji er troubadoururin, frontmaðurin, ið kennir seg heima á palle, og sum fær fjøldina við sær. Maðurin, sum á útlendskum óivað kann kallast "performari". Hann er náttúrligi maðurin at standa fremst. Hann eigur løgini, ið vit hava tikið til okkum. Hann valdi tíðliga tónleikin, livir nú av tónleikinum, men hevur altíð - og ger tað enn - livað fyri tónleikin. Hann er komin eitt fet nærri stjørnunum, teimum, ið bleiktra á innara himmalhválvinum, tá vit ótilvitað tríva í góðar sangir, ella skulu eyðmerkja føroyskan nútíðartónleik, ið hevur fest røtur í hugaheiminum hjá vanliga føroyinginum, ungum sum eldri. Hetta er óivað nóg mikið til at staðfesta troubadourstatus.

Tað var so stuttligt at fáa hesa uppliving enn einaferð; hetta at hoyra teir saman aftur - live!! Plúmm. Úrmælingar eru teir, ongin ivi. Øll vistu tað fríggjakvøldið, øll vildu uppliva ella endurupplivað tað fríggjakvøldið og øll fingu tað staðfest.

Magnus við akkordunum, sum flóta, og fylla so ómetaligt, at tað kennist, sum flýtur yvir, og tað rennur útav pallkantinum. Leivur, ið bæði dugir at dempa seg, tó við flottum kryddi, og so at "fýra av " flottu og stundum krypisku soloirnar. Rógvi, ið er sum kletturin, ið trygt kann byggjast á, tó at listarligar snildir koma ímillum, uttan at skaka rútmu ella heild. Arnold, ið saman við Rógva er kjølfest rútma. Ein lenar seg trygt afturá, tí her er alt í tryggum hondum, umframt at bassurin ger snildir, spælir egnar leiðir, ið skapa aðrar grundlitir undir, tá hinir spæla sær, og so eigur bassurin eisini her náttúrligt pláss sum sololjóðføri. Finnur, ið dugir so mangt, men sum tangentsnillingur bæði leggur seg sum yndisligt tónlag undir, og sum kann taka eina solo, ið gevur andaneyð.

Hjá teimum tykist so lætt og ómakaleyst at skapa hesar stóru løturnar, ið festa seg, og fær okkum at leingjast eftir fleiri slíkum.

Her er talan um serflokk innan tónleikarar! Og vit, sum høvdu vónað, at onkur løta við Plúmm, og teirra tónleiki, onkuntíð aftur kom í Norðurlandahúsinum, fingu okkara 10-15 minuttir hetta kvøld, har Plúmm róði afturá og vísti kynstur síni. Takk fyri tað!!

Hugtakandi var eisini løtan, tá Rúna á Heygum sang Hákunardrongur. Óføra røddin er minst líka góð enn.

## Gott

Sum heild ein góð konsert. Sat ikki rætt fyri til at kunna góðskumeta ljóð ella ljóðmynd. Róð hevur verið fram undir, at Terji ikki "fekk allar teir høgu tónarnar heilt við". Kanska er okkurt í hesum. Fríggjakvøldið var kanska okkurt, serliga í byrjanini, ið kundi bent á, at hann ikki hoyrdi nóg væl, men føddi frontmaðurin staðfesti seg eftir mínum tykki hetta kvøld, og hetta stjól á ongan hátt heildarmyndina.

Tá allar perlurnar høvdu ljómað, slapp eisini skaldið Anker Eli á pall at taka ímóti lógvabrestunum, væl uppiborið. Tað er ikki hvønn dag at vit uppliva slíkt, ið gongur upp í hægri eind; tónleikur, orð og tónleikarar og framførsla!!

*dagfinn@sosialurin.fo*